
Marin í Dali


Ragnar Egilsson


Kjartan Eli Hentze


Susie Midjord


Thomas Rasmussen

# Stórar vónir til nýggja mannin

**Borðtennis-liðið fer avstað við góðum vónum um heiðursmerki. Eitt nýtt andlit er at síggja, og hesin nýggi leikarin skuldi havt møguleika fyri at gera seg galdandi. Eisini hevur hópurin nøkur ung talent**

BORÐTENNIS
*Stefan í Skorini*

Fimm leikarar fara avstað hesuferð - tríggir menn og tvær kvinnur. Borðtennisleikarar hava ofta fingið heiðursmerki við sær heimaftur, og tað skuldu verið góð líkindi fyri at fingið okkurt aftur hesuferð.

## Nýggjur leikari

Venjarin Preben Larsen hevur nevniliga funnið ein dana, ið hevur ættarbond til Føroya, og hann fer at spæla við føroyska landsliðnum á Oyggjaleikunum. Talan er um Thomas Sørensen, ið spælir í donsku kappingini.

Hann spælir dagliga á sama støði sum Kjartan Eli Hentze, sum hevur verið við á Oyggjaleikunum síðan 1997, og tí er hetta eitt ess í ermuni hjá føroyska liðnum.

Fyri tveimum árum síðani fekk Kjartan Eli Hentze bronsu í einmansleiki, og fyri fýra árum síðan fingu føroyingar bronsu í tvímansleiki fyri menn.

Í Thomas hava føroyingar fingið eitt gott kort í hondina bæði í einmansleiki men eisini í tvímansleiki, har Kjartan Eli og hann fara at spæla saman.

- Tann nýggi leikarin kann gerast eitt spennandi íkast fyri okkara viðkomandi. Hann og Kjartan Eli kunnu saman gera eitt sterkt par í tvímansleiki, eins og hann eisini verður ein hóttan í einmansleiki, sigur Petur Niclasen, hjálparvenjari.

## Ung talent

Afturat teimum báðum er Ragnar Egilsson eisini við á liðnum hjá monnum. Hetta er eitt ungt talent, sum vit tó ikki skulu vænta okkum nakað heiðursmerki frá.

Hjá kvinnunum eru tað tvær blaðungar gentur, ið skulu umboða Føroyar. Tær eru Marin í Dali og Susy Midjord. Hetta er fyrstu ferð, at tær eru við, og tí skulu vit ikki vænta okkum at síggja tær heilt frammi í oddinum, men tær kunnu ogna sær virðismiklar royndir á hesum leikunum.

Spennandi verður at síggja, hvussu Føroyar fara at standa seg í liðkappingini. Hendan kapping er uppbygt av fýra dystum í einmansleiki hjá monnum, einum dysti í einmansleiki hjá kvinnum, einum dysti í tvímansleiki hjá kvinnum og einum blandaðum tvímansleiki. Her sleppa tey ungu veruliga at royna sína styrki í harðari kapping, og tað kann vera mennandi fyri leikararnar.

## Kenna ikki mótstøðuna

Seinastu tíggju árini hevur tað verið ein leikari av Isle of Wight, ið hevur verið einaráðandi innan borðtennis hjá monnum. Hetta er ein professionellur leikari, ið hevur verið av eini aðrari planet samanborið við restina av luttakarunum. Tískil hevur tað í veruleikanum bert verið silvur og bronsa at kappast um.

- Vit hava hoyrt, at hesin leikarin ikki verður við í ár, og tað gevur okkum góðar vónir um, at vit kanska kunnu vinna fleiri heiðursmerki, men hetta vita vit tó ikki við vissu enn, sigur Petur Niclasen, sum annars roknar við, at støðið verður á leið tað sama sum fyri tveimum árum síðani.

## Sett menning í verk

Annars metir Petur Niclasen, at støðan innan borðtennis í Føroyum er stabil. Talið av íðkarum er nøkulunda tað sama, sum tað hevur verið í nógv ár, tó at talið av feløgum er minkað.

- Við hesum venjaranum hava vit sett eina menning í gongd, og hetta samspælið riggar væl, metir Petur Niclasen. Hetta síggja vit aftur á landsliðnum, har nøkur ung talent sleppa at royna seg í ár.

# Átta debutantar


Rannvá B. Andreassen


Rannvá Augustinussen


Vivian Bjartalíð


Súsanna Hansen


Mary-Ann Isaksen


Laila Jespersen


Halltóra Joensen


Sólva Joensen


Malena Josephsen


Annelisa Justesen


Bára S. Klakstein


Unn Kragesten


Jacoba Langgaard


Asta Magnussen


Rakul Magnussen


Ása Dam á Neystabø


Ann Olsen


Randi S. Wardum

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Bert ein leikari, sum spælir uttanlands er við í ár, og tað er Sólva Joensen, ið spælir fyri Skjold í Danmark.

Landsliðsvenjarin Álvur Hansen hevur sent boð eftir átjan leikarum, og tað eru tey bæði fremstu liðini í kvinnudeildini, KÍ og B36, ið eru best umboðað.

Sjey leikarar úr KÍ og seks leikarar úr B36 mynda bulin á liðnum. Royndastu leikararnir í oyggjaleikahøpi eru Bára S. Klakstein úr KÍ og Halltóra Joensen úr B36, ið hava leikt átta dystir hvør. Malena Josephsen og Rannvá B. Andreasen (KÍ) hava leikt sjey dystir, og tað hevur Sólva Joensen úr Skjold Bk. eisini. Mest skorandi spælararnir í oyggjaleikahøpi eru Rannvá B. Andreasen við seytjan málum og Halltóra Joensen við trettan.

Seks leikarar vóru við bæði í 2001 og 2003, og fýra leikarar hava bert verið við einaferð áður. Átta leikarar í hópinum eru við fyri fyrstu ferð.

Føroyska vann gull bæði í 2001 og í 2003, og tí fara tær aftur eftir gullinum í ár.

Onkur hevur undrast á, at pláss ikki hevur verið fyri leikarum sum Silju á Borg Færø og Mariu Vang, ið báðar spæla við ÍF Føroyum í Keypmannahavn, men venjarin hevur valt at síggja burtur frá teimum báðum. Tær hava nógvar royndir í slíkum dystum og hava áður verið stuðulsleikarar á liðnum.